Føroyar-Svøríki 34-12 (14-2)

Elddópurin var tungur

Ásko›ararnir mundu bera ótta fyri eini sannari ni›urgering av føroyska li›num eftir fyrsta korteri›, men tá hol fyrst var komi› á, s‡ndu kvinnur okkara, at tær væl kunnu vera vi› í altjó›a kapping-um

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Ta› skuldi gerast tungur bur›ur, tá føroyska kvinnulandsli›i› í hondbólti fór á vøllin til fyrstu altjó›a uppgávu sína.

Mett var› framman undan, at svenska mótstø›an ivaleyst var naka› væl sterkari enn føroyska li›i›, og fyrstu løtuna skuldi ta› eisini vísa seg, at bitin tóktist vera alt ov stórur hjá føroysku gentunum.

Bí›a›u í 18 minuttir

Fyrsta máli› hjá okkara gentum kom ikki fyrr enn í 18. minutti, og tá svenska li›i› tá longu hev›i skoti› níggju mál, var so at siga allur spenningur tikin úr dystinum.

Føroyska spæli› úti á vøllinum sá annars ikki so gali› út, men tá ta› ráddi um at skjóta mál, vóru okkara ei›asørar.

Hetta var› eisini undirstrika av, at ikki færri enn f‡ra brotskøst á ra› vór›u misn‡tt, umframt at leikarar í leysari skotstø›u misn‡ttu. Antin vi› at skjóta á væl leikandi Jenny Lindblom í svensks málinum, ella var› skoti› vi› sí›una av málinum.

Einki er at ivast í, at um føroyska li›i› hev›i skora› okkurt máli› hesa fyrstu løtuna, hev›i talan veri› um heilt ø›rvísi dyst fyri okkara vi›komandi.

Ta› var eins og okkara fingu ein rættan skelk, tá fyrri dysturin móti svium var á skránni. Okkara høvdu sera ilt vi› at halda eitt nú åSe Lundmark, sum her sæst bróta ígjøgnum
Mynd: Álvur Haraldsen

Tók tr‡sti›

Sum nevnt, so skuldu ganga 18 minuttir, á›renn fyrsta føroyska máli› kom á talvuna. Fyri úrsliti›i hev›i hetta einsamalla máli› kanska ikki so nógv at siga, men ta› var sjónligt, hvussu hetta ávirka›i okkara leikarar.

Hetta tók broddin av tr‡stinum á leikarunum, og ta› var sjónligt, at óttin fyri at spæla gjørdist minni eftir hetta.

Sálarliga tungt

Í ítróttahøpi ver›ur ofta tosa› um t‡dningin av sonevndum »succes-upplivinum«, og eina slíka fingu føroysku genturnar fyrstu løtuna av seinna hálvleiki.

Me›an svenska li›i› bert fekk hitt eina máli› hesa fyrstu løtuna, skutu okkara tr‡, og nú kom spæligle›in av álvara fram hjá okkum. Tær høvdu í eina lítla løtu prógva› fyri sær sjálvum, at tær væl kundu vera vi› til at mynda dystin, og nú var hetta eisini ta›, sum tær vildu.

Sóley› Mikkelsen var komin á vøllin, og ta› var skjótt greitt, at hennara vir›ing fyri svium ikki var eins ovurstór, sum hon var hjá fleiri av li›felögunum.

At føroyska li›i› solei›is royndi at svara aftur, sá ikki út til at hóva teimum svensku serliga væl. Vi› Åse Erikson á odda royndu tær nú at seta fer›ina enn meira upp. Hetta eydna›ist sum so eisini, men ta› var tó framvegis líkt til, at okkara megna›u at fylgja vi› høgu fer›ini, sum nú kom í dystin.

Í øllum førum megna›u tær framhaldandi at fylgja vi› leikfer›ini, og í roynd og veru vóru ta› okkara, sum skutu fleiri mál fyrstu 20 minuttirnar av seinna hálvleiki.

Høga leikfer›in kosta›i tó okkara rættiliga fitt av kreftum, og hetta kom eisini aftur um brekku seinasta partin av dystinum.

Orkan rakk nevnliga ikki eins langt sum viljin, og nógv heldur óney›ug mistøk vóru nú at síggja. Álopini vór›u ikki avslutta› á rættan hátt, og ísta›in kundu tær svensku gera sær dælt av fleiri skjótum mótálopum hesa seinastu tí›ina.

Í seinna hálvleiki gekst tó naka› betri. Ikki minst tí ta› skapti slíkan fri›, at Sóley› Mikkelsen beinan vegin fekk sítt spæl at glí›a
Mynd: Álvur Haraldsen

Brotskøstini ávirka›u

Sum nevnt, so var ta› serliga fyrsta partin av dystinum, at okkara tóktust tyngdar av nervum.

Í alt vór›u seks føroysk brotskøst misn‡tt, og einki er at taka seg aftur í, at úrsliti› var› ø›rvísi, um mál fingust burtur úr hesum.

Ta› var eisini sjónligt, at misn‡ttu brotskøstini gjørdu sítt til, at enn meira tr‡st var› lagt á okkara. Eins og tær brádliga høvdu mist ein hvørja trúgv um, at ta› veruliga kundi lata seg gera at skjóta mál yvirhøvur.

Tíbetur vunnu tær á hesum óttanum, og tá hetta fyrst var› gjørt, tóktust tær als ikki at vera so nógv verri enn mótstø›uli›i›, sum ein annars kundi veri› bangin fyri.

Huglagi› broyttist

Undir øllum umstø›um, so var huglagi› á ásko›arunum broytt mundandi, tá dysturin var› li›ugur, um samabori› ver›ur vi› stø›una í hálvleikinum.

Tá vóru fleiri, sum nærum hildu føroyska avriki› vera flovisligt, og at máltalvan vísti 2-14 stu›la›i eisini upp undir hetta tosi›. Eftir dystin vóru flestu ásko›ararnir tó á einum máli um, at hetta var nú kanska ikki so gali› alíkavæl. Samanbori› var› vi› úrslitini hjá fótbóltslandsli›num fyrstu tí›ina, har onkur stórtap eisini vóru á skránni, og vi› menningi av hesum í huga, mundu tey flestu nú halda, at landsli›i› hjá kvinnunum helst hevur eina framtí› hóast alt.

Svøríki-Føroyar 29-22 (14-9)

Nervarnir vóru burtur

Føroyska li›i› reisti seg rættiliga sunnudagin, og í nógv størri mun enn fríggjadagin noyddust svensku genturnar hesa fer› at strí›ast fyri sigrinum

LANDSDYSTUR
Jákup Mørk

Havnafólkini, sum fóru ni›an á Háls sunnudagin at hyggja at landsli›shondbólti mundu vera eitt sindur í iva um, hvat tey skuldu vænta frá føroyska li›num.

Úrslitaliga var dysturin í Klaksvík einki serligt, men sum skiltist á venjara og leikarum, so var avriki tó ikki heilt av eini lei›.

Løgdu hart út

Ta› gjørdist tó skjótt greitt, at her fór talan ikki at ver›a um ein dyst av sama slag, sum tann í Klaksvík.

Føroysku genturnar vóru nevnliga skjótar avsta›, og á›renn svenska li›i› rættiliga var› rakna› vi›, høvdu okkara lagt seg á odda.

Vi› hjálp av einum gó›um li›avriki, skynsomum spæli og eisini einstaklingaavrikum megna›u okkara eisini at halda fast um lei›sluna stóran part av fyrra hálvleiki.

Gó›a gongdin stó› vi› fram til hálvleikurin var á lei› hálvrunnin. Okkara vóru tá framman fyri 8-6, men júst um hetta mundi snara›i dysturin til fyrimuns fyri sviar. Tær vunnu seg upp á hálvleiksstø›una 14-9, og í roynd og veru var ta› hendan løtan, sum avgjørdi dystin.

Stó›u saman í mótgongdini

Onkur kundi kanska veri› bangin fyri, at hetta fór at vi›føra, at seinni hálvleikur fór at ver›a álíkur tí fyrra í Klaksvík, har okkara ongantí› fingu eitt bein til jør›ina.

Móti endanum av fyrra hálvleiki tóktist ta› eisini, sum um okkara aftur hesu fer› gjørdi ta› mistak, at tær gjørdu ov skjótt av í álopsspælinum, solei›is at tær svensku fingu fleiri alt ov løtt mál.

Alt hetta tóktist tó at vera rætta›, tá fri› var› undir seinna hálvleik. Vi› eini sera væl spælandi Sóley› Mikkelsen á odda, helt føroyska li›i› framhaldandi fast um mótstø›uli›i›. Helena hev›i kanska ikki veri› so ógvuliga stinn í fyrra hálvleiki, men nú gav eisini at bíta hjá henni.

Esiini vóru nú fleiri a›rar á li›num, sum veruliga byrja›u at gera vart vi› seg ,solei›is at samla›a li›avriki› eisini lyftist eitt gott petti.

Kanska eitt sindur óreint kundi man sagt, at ta›, at Åse Eriksson ikki var vi› í seinna dystinum, gjørdi uppgávuna hjá svenska li›num heldur lættari. Kanska er naka› um hetta, tí hon er sjálvandi ein t‡›andi leikari. Hinvegin er einki at ivast í, at ta› føroyska avriki› var á nógv hægri stø›i sunnudagin.

Sterkari í sinninum

Samanbori› vi› fyrra dystin li›anna millum, so má sigast, at ta› var sera hugaligt at síggja framgongdina á føroyska li›num.

Sjálvsagt ber ikki til at venja somiki› nógv eitt vikuskifti, at framgongdin skal síggjast frá hesum, men hinvegin man talan heldur hava veri› um, at føroysku genturnar vóru betri fyri sinniliga, tá tær fóru á vøllin til seinna dystin.

Sum tær sjálvar høvdu greitt frá undan dystinum, so vistu tær líti› og einki um Svøríki undan uppger›unum, og tí kann ta› hava veri› ein skelkur hjá teimum, tá dysturin skuldi leikast. Serliga tí svenska li›i› tóktist væl fyri kropsliga.

Harfturat høvdu tær í fyrra dystinum uppliva› ta› sannroynd, at ta› kunnu ver›a langar løtur uttan mál. Ongantí› gjørdust løturnar so langar í seinna dystinum, og hetta eiga tær føroysku allan rós uppibornan fyri. Orsøkin til hetta var nevnliga fyrst og fremst, at ta› ikki í sama mun kom ræ›sla á li›i›.

Royndirnar koma

Alt hetta er sjálvsagt eisini naka›, sum fer at koma so vi› og vi›, so hvørt sum leikararnir á li›num fáa fleiri altjó›a royndir.

Ta› ber neyvan til at meta t‡dningin av royndum nóg høgt. Hesar vi›føra, at leikararnir nógv betri eru førar fyri at standa ímóti teimum bakkøstum, sum altí› fara at koma. Eisini hevur hetta meira ella minni prógva› fyri leikarunum, hvat ta› er, sum krevst fyri at standa seg í slíkum dystum.

Tíski er bert eftir hjá okkum at vóna, at talan her bert var um byrjanina til eitt langt tí›arskei› innan føroyskan hondbólt, har vit stútt og stø›ugt taka lut í altjó›a kappingum. Ver›ur hetta so, er eingin sum helst ivi um, at ta› ver›ur hondbóltinum her á landi til frama.

Hóast tap›, so høvdu føroysku kvinnurnar alla orsøk at fegnast um avriki› í seinna dystinum móti Svøríki
Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum

Málskjúttar:

Svøríki: Therese Horttana 6, Katarina Arvidsson 5 (2), Anna Ljungdahl 3, Linda Nilsson 3, Theresa Claesson 3, Åsa Lundmark 3, Madeleine Olsson 2, Helena Andersson 2 (1), Veronica Isaksson 1, Jennie Florin 1.

Føroyar: Sóley› Mikkelsen 12 (7), Joan Midjord Joensen 4, Katrin á Neystabø 2, Gu›ri› Mortensen 2, Gunnleyg Berg 1, Christina Holm 1.

Ávaringar: Svøríki 2, Føroyar 3

Útvísingar: Svøríki 3, Føroyar 6

Ásko›arar: umlei› 300.

Dómarar úr Hollandi: Ferry van der Helm & Keys Wiebrands

Eins og í fyrra dystinum, so taldist Joan M. Joensen eisini sunnudagin millum tær føroysku, sum veruliga kundu bjó›a mótstø›uni av
Mynd: Álvur Haraldsen